## Taka eisini ímóti klædnatilfari

Reyði Krossur Føroya tekur leygardagin harafturat við takksemi ímóti klædnatilfari at brúka til klútar. Tað kann vera bummullsevni, til dømis brúkt seingjaklæðir, T-shirts v. m. Vit ynskja tó , at lutirnir eru sorteraðir – klútar fyri seg – og klæðir og skógvar fyri seg. Reyði Krossur Føroya tekur leygardagin eisini ímóti slíkum, sum kann seljast á loppumarknaði og í endurnýtslihandli okkara - tó undantikið møblar. Lutirnar vilja vit gjarna hava í pappkassum. Harumframt vilja vit fegin hava øll sløg av bókum.

## Ráðstevna um yrkisútbúgvingar

Í morgin, mikudagin, skipar Mentamálaráðið fyri útbúgvingarráðstevnu á Hotel Føroyum. Landsstýriskvinnan í Mentamálum hevur sett eina nevnd at endurskoða føroysku yrkisútbúgvingarnar og skipanina av hesum. Í nevndini sita umboð fyri Mentamálaráðið, Yrkisdepilin, vinnuskúlarnar og fyri vinnuna. Ráðstevnan á Hotel Føroyum er liður í hesum endurskoðanararbeiði. Hon er ætlað øllum teimum, sum á ein ella annan hátt varða av og hava áhuga í yrkisútbúgvingunum og skipanini av útbúgvingunum, millum annað yrkisnevndir, læruplláss og arbeiðsgevarafeløg. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í skúlamálum, fer at seta ráðstevnuna. Harafturat fara Egil Guðmundsson, skúlastjóri á tekniska skúlanum í Reykjavík, Bente Søgaard, seniorráðgevi í vaksnamannaútbúgvingum (VOX) í Noregi, Hans Th. Hjort, ráðgevi í námsfrøði á Århus Business College, og Eyðun Gaard, formaður í endurskoðanarnevndini, at hava framløgur. Fundarstjóri verður Jan Mortensen. Ráðstevnan, sum er almenn og ókeypis, byrjar klokkan 10.00 og verður væntandi liðug klokkan 15.00.

# ala ungdómin

sosialu viðurskiftini.

Í kanningin siga tey ungu seg mistrívast á fleiri økjum. Eitt nú er helmingurin av teimum 16-17 ára gomlu í døprum huga ella kenna seg tunglynt. Eisini er tað hugstoytt at síggja, at helmingurin av teimum 30.000 ungu í kanningini, siga seg ikki kunna tosa við foreldrini um trupulleikan.



### Lívið á bíðistøðu

Hesa myndina kennir Benedicte Ejlers, sosiologur og deildarleiðari fyri Center for Ludomani í Keypmannahavn aftur. Hvønn dag møtir hon ungdómum, hvørs tilvera er tikin av ræði av gambling.

- Lívið hjá teimum ungu kemur í eina álvarsliga bíðistøðu, har tey missa sambandi við vinfólk og frítíðarítrív. Hetta er sera vandamikið, tí tað er júst í ungdómsárunum, at tey skulu menna seg persónliga og skapa ein samleika. Vit møta fleiri, sum í roynd og veru hava verið burturfrá í fleiri ár, og sum nú mangla hesi árini í menningini. Hetta kann hava álvarsligar samfelagsligar avleiðingar við sær eisini, tí sambært kanningini, er talið av ungum, sum dragast við hesar trupulleikarnar ovurhonds stórt. Tí er tørvurin á fyribyrging eisini risastórur, sigur Benedicte Ejlers, sosiologur, millum annað í viðmerking til kanningina.

### Vandamikil poker- og onlinespøl

Kanningin frá Center for Ungdomsforskning vísir, at poker kann vera sera vandamikið, tí meiri enn helmingurin av teimum ungu, sum javnan spæla poker menna ein óhepnan spæliatburð. Fjórði hvør 16-17 ára gamal danskur drongur hevur roynt at spæla um pengar í poker.

Sambært kanningini økja onlinespøl eisini um vandan fyri at blíva bundin av pengaspæli. Tá tey ungu einaferð hava roynt at gambla á netinum, øktist vandin fyri at enda við einum óhepnum spæliatburði tríggjar ferðir. Av teimum ungu undir 18 ár, sum hava gambla online seinasta mánaðin, hava heili 59 prosent longu útvikla eina óhepnan spæli-atburð vísir kanningin.

Granskingarleiðari, Jens Christian Nielsen, frá Center for Ungdomsforskning sigur soleiðis:

- Online-spølini eru serliga vandamikil, tí tey ganga skjótt fyri seg og ein kann hava fleiri spøl koyrandi í senn. Eisini finnur tú skjótt útav, um tú hevur vunnið ella tapt. Tá verða tey ungu sitandi framman fyri skíggjan fyri at seta fleiri spælipengar í, so tey kunnu vinna tað mista inn aftur.

### Ágangandi marknaðarføring

Seinastu árini hevur Center for Ludomani fingið alt fleiri áheitanir frá fólki, sum eru vorðin bundin av onlinespølum. Har ivast tey ikki í, at orsøkin er, at atgongdin er so nógv lættari og marknaðarføringin sera ágangandi.

- Tað er óhugnaligt at síggja, hvussu væl marknaðarføringin riggar, sigur Benedicte Ejlers.

### Gjaldskort, netbanki og hevikort økja um vandan

Kanningin vísir eisini, at lætta og skjóta atgongdin til pengar er við til at økja um vandan hjá teimum ungu. Tey ungu 12-17 ára gomlu, sum longu hava ein óhepnan spæliatburð, hava í nógv størri mun enn onnur ung atgongd til hevikort, netbanka og gjaldskort. Tí hava tey eisini nógv lættari atgongd til pengarspøl, vísir kanningin.

### Herferð skal upplýsa

Stóra talið av ungum gamblarum og álvarligu avleiðingarnar av hesum eru eisini orsøkin til, at donsku stovnarnir Center for Ludomani, Børns Vilkår, Semandus og DR nú fara undir eina stóra herferð, sum hevur fingið heitið GAMBLER. Endamálið við herferðini er at broyta óhepna spælihugburðinum hjá teimum ungu.

- Nú fara vit av øllum alvi at kunna um vandan, og at geva teimum ungu nøkur amboð, so tey kunnu venda gongdini og menna ein betri spæliatburð, forklárar Benedicte Ejlers.

*Kanningin, sum eitur »Unge og gambling, 12-17-åriges pengespiladfærd i et risiko- og trivselsperspektiv« er gjørd á Center for Ungdomsforskning á Danmarks Pædagogiske Universitetsskole, Århus Universitet. Øll kanningin er at finna á www.cefu.dk eller á heimasíðuni við herferðini GAMBLING: www.gambler.ludomani.dk*